

Í mun til fleiri av undafarnu undankappingunum hevur flogið hjá føroyingum verið gott hetta seinasta árið. Her er Jónas Tór Næs tann fyrri á bóltinum í minniliga 1-1 javnleikinum á Tórsvølli móti Eysturríki
Mynd: Álvur Haraldsen

## Uppgávurnar

**Skráin hjá A-landsliðnum fyri 2009 sær soleiðis út. Hartil kunnu venjingardystir koma upp á tal**

**21.03 Ísland-Føroyar 1-2 *)**
**10.06 Føroyar-Serbia**
**12.08 Føroyar-Frakland**
**05.09 Eysturríki-Føroyar**
**09.09 Føroyar-Litava**
**10.10 Frakland-Føroyar**
**14.10 Rumenia-Føroyar**

***) Heðin Askham var fyribils settur venjari, tá Føroyar tann 21. mars á fyrsta sinni vunnu A-landsdyst í fótbólti móti Íslandi**

# Landsliðsvenjari søkist

**Colin Calderwood var í pottinum, men kjansurin í Newcastle var eftir øllum at døma ov stórur. Tí stóð FSF á berum, júst tá teir annars høvdu sagt, at nú skuldi venjarin setast**

**21. januar kundi Sosialurin staðfesta, hvørjir teir tríggir kandidatarnir til landsliðsvenjarasessin vóru. Tað glapp tó á stokkinum, tá Colin Calderwood skuldi hálast innanborða, og nú góðar tveir mánaðir undan fyrstu stóru uppgávuni er nýggjur landsliðsvenjari enn ikki settur**


Sosialurin
Fjórðihvør uppsagdur hjá ArtiCon
Keyrdi bil til hann var 96 ár
Bara Kári og Hergeir vilja kanna tey almennu
Stegðið kreppu-tesinum
EIN AV HESUM SKAL VENJA LANDSLIÐIÐ

Fyrra árið av EM-undankappingini til 2010 gav okkum bestu byrjanina upp á eina undankapping síðani minniligu entré'ina hjá Landskronaliðnum. Sera hóskandi kom fyrsta altjóða stigið undir leiðsluni hjá Jógvan Martini Olsen ímóti Eysturríki, og hetta saman við góðu úrslitunum annars mundi kennast sum meira enn bara ein lítil uppreisn eftir mótgangin, sum liðið og – serliga – venjarin høvdu merkt.

At landsliðsvenjarin sjálvur eftir næst seinastu úttøku sína boðaði frá, at hann nú gavst sum landsliðsvenjari, gjørdi ikki veturin heilt óspennandi at koma ígjøgnum. Á næst seinasta degnum á árinum boðaði FSF-forsetin frá, at teir nú vóru komnir til avgerandi fasuna í setanini av nýggjum venjara, og ætlandi skuldi hesin setast seinast í januar mánaði.

**Mistu kalvan**

Sosialurin kundi beint undan avgerandi spurtinum avdúka, at valið nú stóð millum serbisk/íslendska Luka Kostic, danska Flemming Serritslev og skotska Colin Calderwood. Atkvøðugreiðsla á netinum gav greið tekin um, at Colin Calderwood var ynskið hjá fólkinum, og hóast navnið ongan tíð varð váttað úr FSF-leguni, so er eingin ivi um, at tað var skotin, sum FSF-valið fall á.

FSF hevði longu tosað við teir tríggjar seinastu kandidatarnar, og allir vóru teir til reiðar at fara í holt við ítøkiligar samráðingar um sáttmála sum landsliðsvenjari. Dimmalætting staðfesti enntá, at Calderwood tann eina dagin var ávegis til Føroya, men hvussu var og ikki, so kom hann ongantíð av bretska meginlandinum. Í Newcastle vildu tey styrkja sær um venjarahópin, og heldur enn at seta kós móti Føroyum, valdi Calderwood at skriva undir sáttmála sum venjari við ábyrgdini av heldur ótætta verjupartinum í Newcastle.

At lagnan síðani vildi tað so, at Calderwood í dag sjálvur annar hevur ábyrgd av kreppurakta Newcastle, var eingin, sum visti tá, men søgan er eitt gott dømi um, hvussu skjótt tingini kunnu henda í altjóða fótbólti. Nakað sum FSF-forsetin eisini støðugt nevndi, tá hann alla tíðina sýtti fyri at nevna nakað sum helst navn kring landsliðsvenjarasetanina.

**Hava tveir mánaðir**

Og nøvn verða framvegis ikki sett á møguligar landsliðsvenjarar á FSF-borgini.

Høgni í Stórustovu sigur, at teir framvegis halda fast um teknaðu vangamyndina av einum komandi landsliðsvenjara, og skal hesin soleiðis vera ein maður, sum eisini kann vera við til at menna føroyskan fótbólt í breiðari merking enn bara við A-landsliðnum.

- Vit hava valt, at vit nú siga sum allarminst um tilgongdina. Men tað er sjálvandi so, at vit tann 10. juni spæla heimadyst móti Serbia, og til ta tíð skulu vit sjálvandi hava sett ein landsliðsvenjara. Og hetta skal vera ein, sum hóskar til okkara vangamynd. Tað hevur stóran týdning fyri okkum, at ítróttarliga linjan er greið, tí við okkar avmarkaða tilfeingi hava vit ikki pláss til mistøk, sigur Høgni í Stórustovu..

– Men tað merkir ikki, at vit vilja stýra venjaranum. Okkara uppgáva er at seta málini og kósina, sum føroyskur fótbóltur skal arbeiða eftir, og so royna vit at fáa ein venjara, sum passar til leistin, sigur FSF-forsetin.

Hvør venjarin so verður, var ikki greitt, tá hesar reglur vórðu skrivaðar. Av teimum trimum, sum vóru í uppskoti er Luka Kostic tó framvegis tøkur, og úrslitini í Newcastle kundu bent á, at Calderwood í løtuni er undir hørðum trýsti. Men um tað verður annar av hesum báðum ella onkur heilt triði stendur í dag sum ein opin spurningur.

**Jákup Mørk**
**jakup@sosialurin.fo**